Jenis av Rana, Miðflokkurin:

# Harmast um úrslitið

**Um veljarakanningin, FYND hevur gjørt fyri Sosialin og portal.fo, skal takast fyri fult, so fær Miðflokkurin onki umboð inn á ting eftir valið. Flokkurin fær bert 2,1% av atkvøðunum, og fyri at fáa mann á ting, krevjast 3,7%. Hetta úrslit harmast formaður floksins, Jenis av Rana, sjálvandi um**

VELJARAKANNING
*Ingrid Bjarnastein*



*Jenis av Rana og Miðflokkurin fingu bert 2,1% av atkvøðunum í veljarakanningini, men hóast hetta lítla tal, so fer flokkurin undir valstríðið við góðum treysti*

– Eg harmist sjálvandi yvir úrslitið, sigur Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum.

– Men eg undrist á, at veljarakanningar eru so svingandi. Fyri nøkrum vikum síðani varð ein veljarakanning gjørd, og har fekk Miðflokkurin yvir 5% av atkvøðunum, og nú so stutt aftaná, fáa vit bara 2,1%.

Formaðurin í Miðflokkinum tekur hetta tó, sum eitt konkret ting, og sigur, at nú er valstríðið eftir fyri framman, sum helst skal gera eitt sindur av muni.

– Ein kann brúka hetta sum eina áheitan til tey, sum eru góð við Miðflokkin um at verja flokkin, og at nú noyðast vit at fara til verka.

### Serføroyskt

Jenis av Rana er sera ónøgdur við háttin fjølmiðlarnir brúka tá tað kemur til at stilla teir ymsu flokkarnar fram.

– Eg hugsi kanska serliga um útvarpið og sjónvarpið, tí tá valstríðið byrjaði, so hevði sjónvarpið eina kjaksending, har bara teir fýra størstu flokkarnir sluppu framat. Tað ber ikki til hjá lítlum flokkum, sum Miðflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum at koma fram á henda hátt. Hetta er serføroyskt demokrati. Í tíðindasendingini kvøldið eftir, fingu hesir báðir flokkarnir bara hálvan annan minutt tilsamans, sigur Jenis av Rana.

– Ein onnur av grundunum til at flokkurin ikki fær so nógvar atkvøður kann eisini vera, at vit hava ikki kunngjørt nakrar valevnislistar enn. Tað er tí at ein so lítil flokkur sum okkara bíðar til síðstu løtu at koma út við listunum, tí tað er ikki beinleiðis gravgangur eftir at sleppa uppá. Tí brúka vit alla ta tíð vit kunnu fáa. Men valskráin verður so løgd fram týsdagin í komandi viku.

Men sjálvt um úrslitið av veljarakanningini kanska var heldur dapurt, so fer Miðflokkurin undir valstríðið við góðum treysti.

– Úrslitið er ein eggjan til floksleiðslu og tann meiniga borgaran um at virka fyri flokkin, so flokkurin kann yvirliva. Tað eru nógv, sum ikki vilja hava, at Miðflokkurin ikki verður aftur at síggja, so valstríðið skal føra okkum út í ljósið, sigur Jenis av Rana at enda.

# Suðuroyingar líkjast sær sjálvum

**Tríggir av fýra suðuroyingum ætla sær at velja Javnaðarflokkin ella Sambandsflokkin**

VELJARAKANNING Í SUÐUROY
*Jóannes Hansen*



*Javnaðarflokkurin, við formanninum Jóannes Eidesgaard á odda, eigur 4 av hvørjum 10 veljarum í Suðuroy. Nú er Sambandsflokkurin klárt á øðrum plássi, meðan Fólkaflokkurin fullkomuliga er smokkaður burtur ímillum*

Suðuroyggin verður ofta nevnd Lítla Danmark. At suðuroyingar framvegis eru meiri til danska ríkið, enn teir eru til fullveldi er veljarakanningin staðfesting av.

Kortini tykist lítil ivi vera um, at Tjóðveldisflokkurin fer at varðveita umdømisvalda tingmannin, sum teir fingu valdan í 1998. Tá hevði Hergeir Nielsen verið burturi úr tinginum síðani á valinum í 1994.

Javnaðarflokkurin eigur fleiri enn fýra av hvørjum tíggju veljarum í Suðuroy, og Sambandsflokkurin er rættuliga tryggur á næstfremsta plássinum.

Flemming Mikkelsen hevur umboðað sambandsflokkin í Suðuroy síðsta valskeiðið, men hann er ikki á listanum hesa ferð.

Á valinum fyri fýra árum síðani var um reppið, at Fólkaflokkurin fekk ein umdømisvaldan tingmann í Suðuroy. Nú er hann fullkomuliga smokkaður burtur í millum aftur.

Høgni Hoydal:

# Vil draga javnaðin á sjálvstýrisleið

**Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, vil fegin hava Javnaðarflokkin við á sjálvstýrisleið eftir valið. Hann fegnast stórliga um úrslitið av veljarakanningini, sum gevur hansara flokki átta tinglimir, men hann stúrir fyri, at sambandsflokkarnir skipa meiriluta og binda Føroyar at Danmark langt fram í tíðina**

VELJARAKANNING
*Stefan í Skorini*



*Høgni Hoydal metir um útlitini fyri, at Tjóðveldisflokkurin kann halda fram í samgongu. Flokkurin vil fegin draga Javnaðarflokkin við á sjálvstýrisleið*

Tjóðveldisflokkurin heldur tørn hóast harðar ákoyringar frá andstøðuni. Flokkurin fær 25,9 prosent í nýggjastu veljarakanningini, og hetta gevur honum átta tinglimir, sum allir eru valdømisvaldir.

Tjóðveldisflokkurin fær sambært kanningini trý umboð úr Suðurstreymoyar valdømi og eitt umboð í øllum hinum valdømunum uttan í Vágunum. Hetta er tað sama sum við seinasta val.

– Fyri flokkin eri eg ógvuliga fegin um úrslitið av kanningini. Hon vísir somu gongd, ið vit hava sæð í kanningum alt valskeiðið, at vit megna at halda tørn hóast vit hava sitið í eini samgongu, sum hevur verið fyri ógvuliga hørðum atfinningum frá andstøðuni. Vanliga missa flokkar umboðan eftir at hava sitið í samgongu í fýra ár, sigur Høgni Hoydal.

Hann stúrir tó samstundis fyri, at sambandsflokkarnir fara at fáa meirilutan og skipa samgongu eftir valið. Hetta hevði sambært formanninum verið ein vanlukka fyri Føroyar.

– Størsti vandin er, at sambandsflokkarnir vinna valið, og at sjálvstýrismálið verður sett til viks og parkerað í fimmti ár framyvir, sigur formaðurin.

### Vil hava Javnaðarflokkin við

Tjóðveldisflokkurin hevur fyrr víst á Javnaðarflokkin sum ein møguligan samgongufelaga. Hann vísir sostatt aftur, at Tjóðveldisflokkurin er bundin at Fólkaflokkinum, um hann ætlar at halda fram í samgongu.

– Vit vilja fegnir draga Javnaðarflokkin við sjálvstýrisleið og skipa eina breiða sjálvstýrissamgongu við Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum. Hetta hevði verið ynskistøðan hjá okkum.

Høgni Hoydal vísir sostatt enn einaferð á, at flokkurin hevur vónir um, at Javnaðarflokkurin fer at vika seg eitt vet í spurninginum um ríkisrættarligu støðuna.

Veljarakanningin vísir eisini, at teir báðir smáu flokkarnir detta úr tinginum. Høgni Hoydal vísir aftur, at hetta kemst av eini polarisering, sum Tjóðveldisflokkurin og samgongan hava elvt til í hesum skeiðnum.

– Nógv vilja fegin gera hetta til eina polarisering, men eg haldi, at henda polariseringin bert er millum politikarar í teimum ymsu flokkunum, men hon er als ikki verulig í fólkinum.

Høgni Hoydal endurtekur eisini, at hetta valið verður eitt lagnuval fyri sjálvstýristilgongdina, og tað er altavgerandi, at føroyingar ikki sleppa hesi tilgongd.



Eyðun Elttør, formaður Sjálvstýrisfloksins vónsvikin, men hevur ikki mist vónina.

# Polariseringin rakar Sjálvstýrisflokkin meint

**Innanhýsis stríðið hevur sjálvandi skatt flokkin, men tað er serstakliga polariseringin, sum hevur rakt flokkin meint heldur formaðurin**

VELJARAKANNING
*Jan Müller*



Eyðun Elttør, landsstýrismaður og formaður í flokkinum. Hann dylur ikki yvir, at hann er sera vónsvikin av hesi kanningini. Hann dylur heldur ikki fyri, at innanhýsis stríðið í flokkinum kann hava skatt umdømið og áhugan fyri flokkinum. – Men sjálvur haldi eg høvuðsorsøkin til afturgongdina vera polariseringina. Tað er henda ótrúliga polariseringin, sum hevur skatt okkum mest. Hon hevur skatt allar flokkarnar í miðjuni. Hon hevur gjørt, at teir hava mist fótafesti.

Stóri taparin á komandi løgtingsvali verður tann lítli Sjálvstýrisflokkurin. Sambart veljarakanningini, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin og Portalin hjá Føroya Tele fær flokkurin einki umboð í løgtingið. Við seinasta val fekk flokkurin tvey umboð á ting. – Hetta ljóðar ikki gott, men vit mugu taka tað við upprættum ryggi og leggja stríðið í flokkinum heilt afturum okkum og syrgja fyri, at flokkurin fær umboð á ting kortini sigur

Eyðun Elttør viðgongur, at flokkurin alla ta fyrstu tíðina av valskeiðnum hevur verið ov víðgongdur á sjálvstýrisøkinum og hevur latið seg toga ov langt út av eitt nú Tjóðveldisflokkinum. Men hann hevði vónað at umskiftið í flokkinum, har tað varð lagt aftur á tann gamla sjálvstýrisbógvin við eini hóvligari stig fyri stig tilgongd, fór at venda hesi gongdini. Tá hon ikki hevur gjørt tað, og flokkurin stendur til at fáa 2,6% og nýtist 3,7 fyri at fáa tingmann, so heldur formaður floksins, at allar góðar kreftir í flokkinum mugu brúka hesar seinastu vikurnar til eitt uppbyggjandi og skilagott valstríð. – Sjálvandi eri eg vónsvikin, men eg havi ikki mist vónina. Tvørturímóti fær henda kanning meg til at brúka alla orku til at fáa flokkinum umboð aftur á ting. Sjálvstýrisflokkurin hevur átt ein týðandi leiklut í føroyskum politikki í eitt mannaminni, og henda leiklut eigur hann ikki at sleppa. Eyðun Elttør heldur tað vera spell, at valið skal blíva ein spurningur um samband ella fullveldi, soleiðis sum veljarakanningin vísir. Hann heldur, at einasta gongda leið er ein hóvlig men miðvís sjálvstýrisleið, sum flokkarnir á miðjuni í føroyskum politikki standa fyri men sum nú verða raktir av polariseringini.

Hóast formaðurin er vónsvikin, so er tað kortini hansara valdømi, sum stendur seg nógv best í kanningini. Meðan 8,1% atkvøða fyri Sjálvstýrisflokkinum í Norðoyggjum, eru tølini fyri Eysturoynna og Suðurstreym, sum fingu tingfólk seinast, ávikavist 2,6 og 2,0%. So her skal gerast eitt ordiligt hál fyri at fáa tingmann valdan. Og tað er hetta hálið, sum Elttør nú ætlar sær í gongd við av álvara. Um tað fer at eydnast vil tíðin vísa.

Anfinn Kallsberg:

# –Als ikki nøktandi úrslit

**Anfinn Kallsberg er ikki nøgdur við teirra part í veljarakanningini. Úrslitið skylast teirri støðugu polarisering. Hann væntar tó meiri valdømisvaldar enn kanningin vísir**

VELJARAKANNING
*Heri á Rógvi*



*Anfinn Kallsberg ikki nøgdur við úrslitið av veljarakanningini, men hann heldur, at tað fer at batna til valið.*

– Sær ikki gott út.

Hetta vóru fyrstu orðini frá Anfinni Kallsberg, løgmanni, tá vit ringdu hann upp fríggjamorgunin eftir viðmerkingum til veljarakanningina, ið Sosialurin í samtarvi við portal.fo hevur latið gjørt.

Kanningin gevur Fólkaflokkin seks tingmenn. Harav eru teir bert tríggir, ið eru valdømisvaldir móti teimum átta nú. Í Norðoyggjum, Norður Streymoy, Suður Streymoy, Vágum og á Sandoynni stendur Fólkaflokkin til eitt missa ein valdømisvaldan. Hesum úrslitinum er Anfinn Kallsberg ikki nøgdur. Hann trýr heldur ikki, at støðan verður soleiðis, tá valið er avgreitt.

Samlað fær Fólkaflokkurin 18,7% í veljarakanningini, og hetta er frægari enn onkur onnur veljarakanning hevur givið Fólkaflokkinum.

– Hetta er als ikki nøktandi. Eg meti, at polariseringin er fremsta orsøkin til, at støðan er sum hon er. Hendan polariseringin kann bara ikki brúkast til nakað, tá ið tað kemur til politikkin, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgmaður sigur seg vænta, at hansara flokkur fær fimm valdømisvaldar kanska fleiri enn. Hann heldur harumframt, at Fólkaflokkurin altíð fær eitt tílíkt úrslit í veljarakanningunum, men hann er framvegis ikki nøgdur.

– Tað er ringt at siga, hvat tað er, sum ger, at vit fáa so mikið lítið. Tað eru eisini tað smáu marginalarnir, ið gera seg galdandi í veljarakanningi, og vit kundu kanska havt fingið sjey og Sambandsflokkurin átta, og hetta vildi broytt munandi upp á støðuna, sigur Anfinn Kallsberg.

Í hansara egna valdømi, Norðoyggjum stendur verri til nú enn við løgtingsvalið seinast, um vit meta eftir veljarakanningini. Veljarakanningin hevur tikið hvørt valdømi sær. í Norðoyggjum eigur Fólkaflokkurin í løtuni tveir valdømisvaldar tingmenn, Anfinn Kallsberg og Jógvan við Keldu. Veljarakanningin gevur tó Fólkaflokkinum bert tann eina mannin har við 27,7%. Sambandsflokkurin fær 17,4%, og hetta gevur teimum ein valdømisvaldan tingmann.

– Vit plaga at liggja um 29% í Norðoyggjum til løgtingsval, og eg rokni eisini við, at hetta fer at hækka til hetta støðið aftur, sigur Anfinn Kallsberg.

Hann heldur ikki, at teir hava gjørt ov lítið við hetta valdømið.

Til veljarakanningina sum heild sigur Anfinn Kallsberg, at hann ikki trýr uppá, at Sambandsflokkurin fær níggju tingmenn, men hann vil ikki undirmeta styrkina hjá Sambandsflokkinum.

Anfinn Kallsberg vil ikki gera aðra viðmerking til samgongumøguleikar enn, at teir vilja hyggja at hesum, tá valúrslitið er greitt.

– Vit halda á við sama boðskapi og somu ætlan, ljóðar tað frá Anfinni Kallsberg.

Sambært hesari seinastu veljarakanningini kunnu sitandi samgongufelagar Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin ikki einsamallir skipa samgongu.

*Lesið meira um veljarakanninga á síðu 18 og 19*


-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

| | |
|---|---|
| **TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL** Skrás.: 10-03-99 Km.: 46.000 Prísur: 148.600,- Garanti* | **NISSAN MICRA 1,3** Skrás.: 25-04-96 Km.: 85.000 Prísur: 58.600,- Garanti* |
| **TOYOTA AVENSIS 2,0 TDI** Skrás.: 25-10-99 Km.: 50.000 Prísur: 160.600,- Garanti** | **FORD MONDEO 1,8 STW.** Skrás.: 09-07-98 Km.: 30.000 Prísur: 140.600,- Garanti* |
| **TOYOTA AVENSIS 2,0 TDI TERRA** Skrás.: 29-04-99 Km.: 82.000 Prísur: 154.600,- Garanti* | **OPEL ASTRA 1,7 DIESEL** Skrás.: 31-03-94 Km.: 176.000 Prísur: 48.600,- Sýnaður 02-01 |
| **TOYOTA AVENSIS 2,0 TDI SOL** Skrás.: 14-01-99 Km.: 130.000 Prísur: 157.600,- Garanti* | **OPEL ASTRA 1,6 STW.** Skrás.: 01-04-98 Km.: 82.000 Prísur: 95.600,- Garanti* |
| **TOYOTA AVENSIS 2,0 TDI TERRA** Skrás.: 23-11-99 Km.: 68.000 Prísur: 154.600,- Garanti* | **CITROEN ZX** Skrás.: 24-05-95 Km.: 57.000 Prísur: 64.600,- Sýnaður 04-01 |
| **TOYOTA CARINA 1,6 SEDAN** Skrás.: 23-08-95 Km.: 103.000 Prísur: 87.600,- Garanti* Sýnaður 05-01 | **SUZUIKI ALTO 1.0** Skrás.: 21-09-98 Km.: 31.000 Prísur: 63.600,- |
| **TOYOTA CARINA 1,6 SED.** Skrás.: 30-03-95 Km.: 53.000 Prísur: 89.600,- Garanti* Sýnaður 09-01 | **FORD SIERRA 1,8 DIESEL** Skrás.: 28-11-91 Km.: 217.000 Prísur: 38.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL STATION** Skrás.: 11-06-98 Km.: 115.000 Prísur: 120.600,- Garanti* | **RENAULT TWINGO** Skrás.: 10-06-96 Km.: 86.000 Prísur: 86.000,- Sýnaður 03-01 |
| **TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL** Skrás.: 29-01-99 Km.: 136.000 Prísur: 42.000,- Garanti* | **FIAT BRAVO 1,4** Skrás.: 22-03-96 Km.: 53.000 Prísur: 63.600,- Sýnaður 10-00 |
| **TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL** Skrás.: 02-06-99 Km.: 78.000 Prísur: 132.000,- Garanti** | **VW GOLF 1,8** Skrás.: 16-01-97 Km.: 64.000 Prísur: 98.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 H/B** Skrás.: 27-05-98 Km.: 22.000 Prísur: 98.600,- Garanti* | **HONDA CIVIC 1,4 SEDAN** Skrás.: 09-03-99 Km.: 45.000 Prísur: 112.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 H/B** Skrás.: 17-01-95 Km.: 175.000 Prísur: 65.600,- Sýnaður 06-01 | **FORD SIERRA 1,8 DIESEL** Skrás.: 28-11-91 Km.: 217.000 Prísur: 38.600,- Sýnaður 10-01 |
| **KIA SPORTAGE 4X4 T-DIESEL** Skrás.: 02-09-98 Km.: 84.000 Prísur: 134.600,- | * Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN ** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato. |

VØRUVOGNAR

| | |
|---|---|
| **TOYOTA HILUX 4X4 PICK-UP** Skrás.: 26-02-99 Km.: 63.000 Prísur: 132.600,- | **MAZDA E 2200 4X4 VØRUVOGNUR** Skrás.: 14-10-96 Km.: 69.000 Prísur: 79.600,- Sýnaður 11-00 |

STØKK INN Á GÓLVIÐ

REYNI SERVICE

Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040

Sosialurin - 311820